# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um sarkom í beinagrind, retroperitoneum ella abdomen

## Sjúkueyðkenni ísv. illgruna um sarkom

Illgruni til sarkom í beinagrind og bleytlutum stendst av

- Ífylla í bleytlutum > 5 cm í diametur (støddin tó minni hjá børnum)
- Ífylla í bleytlutum á ella undir fasciu
- Skjóttvaksandi bleytlutsífylla
- Palpabul ífylla í beinagrind
- Djúp áhaldandi pína í beinagrindini uttan aðra upplagda orsøk
- Illgruni um residiv av fyrrverandi sarkomi

Sjúklingar við sarkom í retroperitoneum og abdomen verða vanliga útgreinaðir og eyðmerktir í øðrum serøki fyrst

- Sjúkueyðkennini eru tó ógreið pína í búkinum íroknað bløðing frá ovaru GI-rásini, anæmi, pína og ífylla í abdomen

## Ítøkiligur illgruni um sarkom íkomin av:

*Sarkom í beinagrind og bleytlutum*

- Malignitetssuspektar broytingar á MR-skanning við ífyllu í bleytlutum
- Malignitetssuspektar broytingar á røntgen og MR-skanning við ífyllu í beinagrind
- Sarkom funnið við patologi í avskurði av ífyllu
- Sarkom funnið óvæntað í avskurði av beinagrind ella bleytluti

*Sarkom í retroperitonum og búki*

- Ífylla funnin við radiologi (MR/CT) í retroperitoneum uttan aðra upplagda orsøk
- Abdominal ífylla (ávíst á MR- ella CT-skanning) millum gøgn
- Óvæntað staðfest sarkom í burturbeindari ífyllu í búkinum

## Vandabólkar

Tað finnast fáar kendar dispositiónir fyri sarkom. Tað snýr seg í høvuðsheitum um ioniserandi stráling og kroniskt trot. Harumframt hava sjúklingar við summum syndromum við multiplum góðkynjaðum ífyllum sum Mb. Recklinghausen (neurofibrom), Mb. Ollier/Mb. Maffucci (endokrom) og multiplum osteokondromum ein signifikant øktan vanda fyri at fáa sarkom. Sjúklingar við fyrrverandi krabba eru eisini í einum vandabólki fyri krabba í beinagrindini.

## Kanningar, ið ávísandi lækni skal gera

Bíleggja røntgenkanning av limi, ið sjúklingurin hevur pínu í
Gera eina neyva objektiva kanning
Innheinta eina góða sjúkrasøgu, íroknað hvussu leingi pína hevur verið og um krabba áður.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um sarkom í beinagrind, retroperitoneum ella abdomen" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026